Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Aksel V. Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Veðhald í landbúnaðinum

Spurningar:

1. Hvussu langt er arbeiðið komið við at fara frá persónligum veðhaldi fyri lán til landbúnaðin?
2. Er landsstýrismaðurin av teirri áskoðan, at festarar ikki skulu veðseta persónligt?

Viðmerkingar:
Ætlaði ein festibóndi at gera íløgur í festið áðrenn 2004, bar til at taka eitt festilán og garður, rakstrargøgn o.a. varð sett í veð fyri lánið. Í 2004 bleiv mjólkarkvotan umsetilig, og tá kravdi Búnaðargrunnurin veð í mjólkarkvotuni, skuldi eitt lán takast. Fleiri bøndur vóru tá ónøgdir, tí kvotan var privat ogn, meðan festið var ogn landsins.

Í 2007 var talan um at broyta lógina um landsjørð. Ætlanir vóru um at einskilja innangarðsjørðina og fjósini. Tá varð sagt, at verður talan um privata ogn, má veðsetingin eisini vera persónlig. Men tað vísti seg at enda við, at bara skuldin varð einskild, og ongar broytingar vórðu gjørdar viðvíkjandi ognarviðurskiftunum av innangarðsjørðini. Hetta merkir, at tá ein festibóndi í dag ger íløgur í festið, so veðsetir festarin persónligt, hóast hann einki eigur.

Løgtingsins umboðsmaður viðgjørdi eitt mál av hesum slag í 2007 og metti tá, at kravið frá Búnaðargrunninum um persónliga veðseting er ein órímilig treyt at seta festarum. Løgtingsins umboðsmaður vísti á, at tann hátturin, sum grunnurin velur at tryggja sínar ognir uppá, stendur ikki í mát við tær avleiðingar, sum kunnu verða fyri festaran.

Í svari frá táverandi umhvørvis- og vinnumálaráðharranum, Helga Abrahamsen, í apríl 2020 (nr. 69/2019) bleiv sagt, at arbeitt verður við at fara burtur frá persónligum veðhaldi fyri lán til landbúnaðin. Málið er ikki komið í rættlag enn. Neyðugt er at fáa hesi viðurskifti broytt sum skjótast. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 10. september 2021

Aksel V. Johannesen